# Professionalisma á Landssjúkrahúsinum

HALDA OLSEN

á Ellisheiminum

Nógv verður sagt og skrivað um landssjúkrahúsið. Tíðanverri verður einki sagt ella skrivað um tað góða.

Alt tað skal eg ikki taka støðu til, men eg havi eina meining. Hon er at tað skal leitast bæði væl og leingi eftir slíkari professoinalismu millum starvsfólkið har. Eg var fyri stuttum akutt innløgd - og við fylgjandi operatión.

Tað dygdar arbeiðið, ið har var útført, sigur mær, at tað ikki einans finst á tí deildini, ið eg lá á. Tí er mín konklutión, at á Landssjúkrahúsinum kunnu tey saktans seta seg javnbjóðis við onnur sjúkrahús kring heimin.

Tey hava øll alla virðing uppiborna.

Gott var at koma heim aftur á Ellisheimið og fáa so hjartaliga móttøku, og har eg fái alla ta hjálp, ið mær tørvar.

Jú gott er at kenna, at enn býr fjálgan í føroyska fólkinum. Til seinast vil eg heilsa øllum, ið um meg vóru við hávirðing og biðja harran um at signa allar hjálpandi hendur.

# Ráðførsla í uttanlandsnevndini um flúgving í føroyskum lofthavið

HERGEIR NIELSEN



Soleiðis sum málið er lýst, verður mælt frá at geva loyvi at flúgva í føroyskum loftrúmi og at lenda í Føroyum við skaðiligum farmi.

Hvør flúgving, fram er farin í farna ári, verður ikki upplýst, og hvussu vandamikil ella skaðiligur farmurin er, verður heldur ikki upplýst.

Vit fáa sostatt onga hóming av, um ætlaða flúgvingin er í samsvari við føroysk áhugamál ella ikki, og heldur onga hóming fáa vit av, hvør tilbúgving krevst, um veruligur vandi stendst av tí vandamikla farmi, ið møguliga fer at lenda í Føroyum.

Ísland og Noregi hava kastað saman um strategiska týdningin av lofthavinum í Norðurhøvum. Tað velduga føroyska loftrúmið gerst partur av hesi ætlan, men uttan føroyska luttøku, tí føroyskur sjálvsavgerðarrættur er tyrvdur undir donsku grundlógini og "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne."

Upplýst er, at Ísland hevur ábyrgdina og umsitingina av lofthavinum yvir Føroyum, men hvørki á tingi ella á fólkaatingi fæst nakað at vita um, hvussu stór ferðslan er, ella hvørji gjøld verða tikin fyri at flúgva í føroyskum loftrúmi.

Uttanlandsnevndin er ikki er tikin upp á ráð í avhendingini av ábyrgd og umsiting av føroyska lofthavinum. Tað kennist tí heldur kollut at sama uttanlandsnevnd skal ráðgeva løgmanni um, hvør kann flúgva í einum lofthavi, sum danir hava avreitt íslendingum at umsita og bera ábyrgdina av.

Loftvegis flutningur og lending við vandamiklum evnum, píning av fangum og mannarættindi teirra eru ógvuliga viðkvom og nógv umrødd evni aðrastaðni í heiminum, har altjóðaagerðin hevur flutt okkum munandi nærri hvør at øðrum.

Altjóða felagsskapir, harímillum Amnesty International, ST nevndin móti pining og ST serfrøðingar hava mælt til, at Guantánamo-legan á Kuba verður latin aftur. Kortini heldur hendan legan fram saman við øðrum legum av sama slagi, og fleiri og fleiri dømi um píning av sekum sum ósekum røkka við jøvnum millumbilum fjølmiðlunum kring allan heimin.

Nýggj lóggáva, sum beinleiðis er í stríð við altjóða mannarættindi, hevur millum annað við sær, at fangar kunnu sita lívstíð í amerikonskum varðhaldi uttan ákæru og uttan rætt til verju, har próvtilfar, sum er komið fram undir píning, verður nýtt.

Váttaði tíðindi frá FBI um píning av fangum í Guantanamo leguni, eru tengd at loftvegis flutningi av hesum fangum, og tá bendir nógv á, at vit møguliga standa hesum brotsverkum nærri enn gott er.

Vísandi til hesi brot á mannarættindini verður enn eina ferð mælt løgmanni til at krevja av donsku stjórnini, at hon virðir mannarættindini og undir ongum umstøðum loyvir flutningi í føroyskum lofthavi av fangum uttan rættartrygd.

Staðfest verður enn eina ferð, at eingi frambrot hava verið í føroyskum uttanríkis- og trygdarpolitiskum áhugamálum yvirhøvur.

Uttanríkispolitiska heimildarlógin gevur eina røð av bindingum, men ongar heimildir, og Fámjinsskjalið sæst als ongan týdning hava fingið yvirhøvur.

Nógva stásið, ið gjørt varð burtur úr Fámjinsskjalinum frá 29. mars 2005, ið skuldi tryggja Føroyum ektað innlit og veruliga ávirkan á uttanríkis- og trygdarpolitisk viðurskifti, sæst ikki vera vert tað pappír, tað er skrivað á.

Í løgtingsmáli nr. 70/2005 og nr. 14/2007, skeyt Tjóðveldi ma. upp, at føroyska lofthavið skuldi undir føroyska umsiting.

Vóru hesi mál samtykt, høvdu vit havt eina munandi sterkari tilgongd bæði til EFTA-felagsskapin, ECAA loftferðslumálið og til samlaða spurningin um loyvi til flúgving í føroyskum loftrúmi yivrhøvur.

Hóast løgtingið samtykti, at øll tiltøk mótvegis Irak skuldu góðkennast av ST, so endaðu bæði danir og føroyingar í einum borgarakríggið, sum løgtingið tók greiða frástøðu frá. Heldur ikki sæst løgtingið hava verið partur í rýmingini úr hesum kríggið, sum vit bera ábyrgd av, og sum framvegis herjar og drepur frá hond.

Flúgving í føroyskum lofthavi við hernaðarflogførum við vandamiklum evnum er helst tengt at hesum kríggið og øðrum ófriði kring heimin. Upplýst verður ikki, hvørji hesi vandamiklu evni eru, sum møguliga lenda í Føroyum, og føroysk tilbúgving stendur á berum í so máta.

Heldur ikki verður sagt eitt orð um flutning av fangum í føroyskum lofthavi.

Málið er stak illa lýst, og føroyingar umsita ikki tað, sum fer yvir høvdinum á teimum.

Hóast so er, so verður, vísandi til frammanfyri nevnda, enn eina ferð mælt løgmanni frá at geva loyvi til flúgving til ófrættakend endamál.

Harafturat eigur løgmaður at átala og krevja av dønum, at Føroyar móti føroyskum vilja ongantíð aftur gerast partur av skammiligum og óvirðiligum krígsherðindum aðrastaðni á knøttinum, og at føroyskt lofthav undir ongum umstøðum verður brúkt til tílík endamál aftur.

Tórshavn, tann 11. desember 2007

# Stór viðurkenning til eitt listafólk

VIRÐISLØN
*Tíðindaskriv*

Hósmorgunin 8. februar kl. 10 verður almenn móttøku á Fróðskaparsetrinum, J.C. Svabos gøtu 14, í sambandi við, at gáva verður latin úr grunni Thorvalds Poulsen av Steinum.

Aftur í ár fær eitt ungt føroyskt listafólk 60.000 kr í gávu úr grunni Thorvalds Poulsen av Steinum. Gávan verður latin listafólki, sum nevndin metir skarar framúr og tí kann koma langt á síni listarligu leið.

Listafólkið, sum fær gávuna, verður persónliga til staðar til móttøkuna, so tit kunnu fáa myndir og práta við viðkomandi aftaná.

Endamálið við grunninum er at stuðla og eggja ungum fólki at fáa sær listarliga útbúgving. Thorvald Poulsen av Steinum, ið stovnaði grunnin, var gartnari í Havn og hevði stóran áhuga fyri bókmentum og list. Tað ber ikki til at søkja pengar úr grunninum. Nevndin í grunninum finnur sjálv fram til ung listafólk, sum tey meta hava serligt hegni. Nevndarlimirnir í grunninum eru formaður Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetrinum, Oddfríður M. Rasmussen, formaður í LISA og Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag.

Hetta er 8 árið á rað, at gávugóðs verður latið úr grunninum, gávugóðsið var fyrstu ferð latið í 2001, og síðan hava 11 ung listafólk fingið gávu úr grunninum, tey eru hesi:

| | | |
|---|---|---|
| 2001 | Rannuvá Kunoy, listakvinna | 60.000 kr |
| 2002 | Andrass Olsen, trombonspælari | 60.000 kr |
| | Teitur Árnason, filmsleikstjóri | 25.000 kr |
| | Petur Elias Askam Guttesen, rithøvundur | 25.000 kr |
| 2003 | Tróndur Bogason, tónleikari og tónaskald | 60.000 kr |
| 2004 | Marjun Kjelnæs, rithøvundur | 25.000 kr |
| | Jógvan Sverrason Biskupstø, sniðgevi og teknari | 25.000 kr |
| | Eivør Pálsdóttir, songkvinna | 25.000 kr |
| 2005 | Bárður Oskarsson, teknari og rithøvundur | 60.000 kr |
| 2006 | Jóhanna Reginsdóttir av Steinum, sniðgevi | 60.000 kr |
| 2007 | Sámal Blak | 60.000 kr |

# Bóklingur um ung og elektroniskar samskiftismiðlar

## Dátueftirlitið skipar fyri almennum fundi í Miðlahúsinum

UNG OG SAMSKIFTI
*Tíðindaskriv*

Vit brúka internetið dagliga og lata nógvar persónsupplýsingar eftir okkum, uttan at geva okkum far um, hvussu hesar upplýsingar kunnu verða nýttar og møguliga misnýttar av øðrum. Eisini vísa kanningar, at netið er vorðið ein lættur miðil at happa onnur, og at børn og ung dagliga verða happað umvegis internetið.

Dátueftirlitið hevur við stuðli frá KT-deplinum og Føroya Tele gjørt ein bókling um ung og elektroniskar samskiftismiðlar. Í bóklinginum verður høvuðsdentur lagdur á internetnýtslu, men telefonsamskifti, sms-boð og vakmyndatól verða eisini viðgjørd.

Bóklingurin verður almannakunngjørdur á almennum fundi í Miðlahúsinum mikudagin 6. februar kl. 19.00

Bóklingurin er ætlaður sum kunning til tey ungu, so at tey verða meira varin við, hvat tey gera á netinum. Endamálið er at gera tey varug við, at tey eru ikki anonym á internetinum men lata slóðir eftir seg, sum onnur kunnu nýta í øðrum samanhangi.

Boðskapurin er, at tey skulu hugsa seg gjølla um, áðrenn tey lata sínar persónligu upplýsingar frá sær og eisini tá tey handfara upplýsingar um onnur á netinum. Á henda hátt vónar Dátueftirlitið at verða viðvirkandi til, at tey ungu kunnu fáa virðing fyri, hvussu hesin miðil skal nýtast.

Somuleiðis vera framløgur, kjak og pallborðsorðaskifti á skránni.

Luttakarar í pallborðinum eru:

Anna S. Dalsgaard, trivnaðarráðgevi

Annlis Bjarkhamar, verkætlanarleiðari fyri www.eg.fo

Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag

Turið Debes Hentze, forkvinna í Dáturáðnum

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.